## Gamlar bøkur stolnar



Løgreglan í Reykjavík leitar eftir nøkrum gomlum og virðismiklum bókum, sum eru horvnar tað tað seinasta árið. Tær fyrstu hvurvu á heysti í 2006 og tær seinastu um heystið í fjør. Talan er um Snorra-Eddu og Vøluspá frá 17. øld, Kongasøgurnar Snorra Sturlusonar frá 1633 og ymsar útgávur av Njáls søgu frá 19. øld. Umframt bøkurnar eru nøkur gomul kort av Íslandi og nakrar virðismiklar útlendskar bøkur horvnar úr sama savni.

## Maru Seafood missir milliónir

Verkfallið hjá fiskimonnum kostar Maru Seafood fleiri milliónir krónur um vikuna, sigur stjórin. – Vit hava 8 skip og trý virki við umleið 350 fólkum, sum liggja still, sigur stjórin í Maru Seafood, Jóhan Páll Joensen, við Norðlýsið. Hann leggur afturat, at árið í fjør royndist stak illa av millum annað vánaligum fiskiskapi og tekniskum trupulleikum hjá skipunum. – Tá vit so eisini taka við, at besta tíðin á árinum hjá skipum og virkjum er seinasti ársfjórðingur og fyrsti ársfjórðingur, so rakar verkfallið sera meint, sigur Jóhan Páll Joensen. Stjórin í Maru Seafood sigur, at støðan er hættislig, tí felagið missir milliónir av krónum hvørja viku, so leingi verkfallið stendur við.

# Olshanu-kanning liðug í summar

**- Vit hava biðið um hjálp til at gera eina innanhýsis kanning av Olshanu-málinum, og henda kanning verður væntandi liðug móti sumri, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður**



*- Var tað rætt at toga »Olshanu« av Flesjunum, áðrenn oljan var tikin úr skipinum við teimum upplýsingum, tilfari og vitan, sum var tøk? Tað er ein av spurningunum, sum føroyski advokaturin og norski serfrøðingurin innan tilbúgving skulu kanna*

*Myn: Jens Kr. Vang*

KANNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Vit hava ikki orku til at gera hesa kanning sjálvi, og tí hava vit leitað okkum løgfrøðisliga hjálp í Føroyum og serkøna hjálp í Noregi, sigur landsstýrismaðurin.

Tað eru teir báðir, Halgir Winther Poulsen, advokatur og norðmaðurin, Jørn Harald Andersen, sum er verkfrøðingur og serkønur innan tilbúgving, sum skulu gera kanningina av Olshanu-málinum.

Tað er Bjørn Kalsø, sum hevur sett teir báðar at gera hesa kanning.

Landsstýrismaðurin sigur, at Jørn Harald síðan ár 2000 hevur starvast hjá Norconsult AS.

### Tríggir spurningar

Arbeiðssetningurin hjá Halgiri W. Poulsen og Jørn Harald Andersen er í fyrsta lagi at fáa greiði á trimum spurningum:

Var tað rætt at toga »Olshanu« av Flesjunum, áðrenn oljan var tikin úr skipinum við teimum upplýsingum, tilfari og vitan, sum var tøk? Var nóg nógv gjørt fyri at útvega upplýsingar, tilfar og vitan at byggja avgerðina á?

Um svarið er nei, hvør var so høvuðsorsøkin til at ikki varð farið rætt fram?

3) Mett eigur at verða um, hvørt galdandi bjargingarskipan, ábyrgdarbýti, mannagongdir og samskifti treingja til ábøtur, eins og tilmæli eigur at verða givið um møguligar ábøtur fyri at minka um vandan fyri, at tílíkt endurtekur seg.

### Savna tilfar

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, sigur, at teir báðir so smátt eru farnir í gongd við at savna tilfar.

- Vit hava eisini samband við Fjarskiftiseftirlitið um, hvussu langt vit sleppa eftir tilfari, og hvussu hetta skal brúkast í arbeiðnum at kanna Olshanu-málið.

Bjørn Kalsø væntar ikki, at Halgir W. Poulsen og Jørn Harald Andersen verða lidnir við sítt arbeiði fyrr enn fram móti sumri.

# Neyðugt við oljustuðli

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað sigur fiskiskiparin í Hundested í Danmark, Steen Jørgensen, sum eisini er fakfelagsmaður hjá donskum fiskimonnum.

- Neyðugt er við onkrum smáum tillagingum her og har í fiskiveiðiskipanini. Annars gongur tað ógvuliga væl, og friður er við at leggja seg yvir donsku fiskivinnuna aftur.

Steen sigur, at hann eftirhondini hevur vant seg við nýggju fiskiveiðireglurnar, sum komu í gildi fyri skjótt einum ári síðan. Tað hava hansara bátsfelagar eisini.

Men nú eru tað oljuprísirnir, sum órógva - og hótta.

- Prísirnir á diesel eru tvífaldaðir seinastu 3-4 árini. Soleiðis eru útreiðslurnar fyri hvørt kilo av fiski, vit veiða, eisini nógv øktar. Hetta er helst størsti trupulleikin hjá fiskivinnuni í løtuni, sigur Steen Jørgensen.

Hann heldur, at onkrir møguleikar eru, sum kunnu minka um oljunýtsluna og nevnir, at framleiðarar nú eru farnir at gera størri skrúvur til skip og bátar.

- Stórar skrúvur hava størri tóvmegi og brúka minni olju. Eg vænti, at vit kundu minkað um okkara oljunýtslu úr 30 litrum um tíman niður í 20 litrar um tíman við eini størri skrúvu.

Men hetta er ikki nóg mikið, leggur hann aftrat.

- Fiskivinnuni á sjónum tørvar stuðul til orku, um hon skal yvirliva. Vit hava verið ímóti stuðli, tí hesin gongur ímóti okkara stoltleika og fríheit sum fiskimenn. Men nú síggja vit, at stuðul er neyðugur, um vit í longdini skulu megna at yvirliva, sigur danski fiskiskiparin við danska Dagbladet.



# Spar olju við stórari skrúvu

ORKUSPARING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

3,2 metrar í tvørmát.

So stór er skipsskrúvan, sum skrúvuverksmiðjan í Danmark, Hundested Propeller, skjótt fer at lata størsta pelagiska skipinum í Danmark.

Sambært stjóranum á verksmiðjuni, Mogens Christensen, veksur eftirspurningurin eftir stórum skrúvum, nú oljan er vorðin so dýr. Jú, størri skrúvurnar eru, jú størri verður drívmegin.

- Skipaeigarar eru eisini farnir at spyrja eftir skrúvum við trimum bløðum, sum vóru nógv brúktar í sjeytiárunum, sigur Mogens, sum júst hevur fingið eina bílegging upp á eina skrúvu við trimum bløðum til ein nýggjan danskan útróðrarbát.

Stjórin sigur við danska Dagbladet, at orkan verður størri við eini skrúvu, sum hevur trý bløð enn eini, sum hevur fýra bløð.

- Krøv eru sett til skipasmiðjur, sum byggja skip, at tær skulu lata skipini hava stórt skrúvupláss, so pláss er fyri heilt stórum skrúvum.

Sambært stjóranum eru hetta heilt nýggj krøv.

At stórar skrúvur geva meira tóvmegi enn smáar, hava vit altíð vitað. Í hesum er eitt nýtt. Tað nýggja er, at skipasmiðjurnar nú byggja skip og bátar soleiðis, at pláss verður gjørt til stórar skrúvur, sigur Mogens Christensen, stjóri.